Stongdu kanadisku havnirnar:

# Stongsulin verður helst avblástur



*Nú bendir alt á, at stongdu kanadisku havnirnar verða latnar uppaftur fyri føroyskum fiskiskipum*

**Í samráð við felagið Rækjuskip, fór landsstýrið ætlandi longu í gjár at senda eina fráboðan til kanadisku myndugleikarnar um, at vit ikki fara at fiska av kvotuni á Grand Bank, sum vit sjálvir hava ásett, men fara í hesum árinum at halda okkum til kvotuna, sum NAFO hevur tillutað okkum. Málið um søguligu rættindini í altjóða sjógvi á Grand eru tó ikki slept, men verður tikið uppaftur millum partarnar**

STONGSUL
*Vilmund Jacobsen*

Eftir at fundurin í Halifax í Kanada millum Jacob Vestergaard, landsstýrismann í fiskivinnumálum og kanadiska fiskimálaráðharran, Robert Thibault, endaði úrslitaleysur, eru nú kortini útlit til, at stongdu havnirnar í Kanada verða lætnar uppaftur fyri føroyskum fiskiskipum.

Á fundinum í Kanada hildu føroyingar fast um, at vit eiga søgulig rættindi í altjóða sjógvi á Grand Bank, hóast býtið hjá NAFO ikki tekur hædd fyri hesum.

Fiskidagarnir hjá føroyingum á Flemmish Kap eru tillutaðir við atliti til søgulig rættindi, men tað hevur ikki latið seg gera hjá føroyingum at vinna frama fyri hesum sjónarmiðum, tá ið ræður um Grand Bank.

Á fundinum í Kanada hildu Robert Thibault og hansara fólk fast um, at føroyingar skulu ganga undir kvotuna, sum NAFO hevur ásett, um stongsulin skal takast av aftur.

Hetta merkir, at vilja føroyingar ikki ganga undir NAFO-kvotuna, men í staðin fiska ta kvotu, vit meta okkum eiga rættin til, vera kanadisku havnirnar verandi stongdar fyri føroyskum fiskiskipum.

Bæði landsstýrið og felagið Rækjuskip hava staðið saman um, at okkara tillutaða kvota á Grand Bank er alt ov lítil í mun til søguligu rættindini. Men higartil hava føroysku sjónarmiðini ikki vunnið frama millum NAFO-limalondini. At »objecta«, sum tað eitur á fakmáli, er ikki ólógligt, og tí er tað heldur ikki ólógligt, at føroysk skip fiska ta kvotu á Grand Bank, sum vit meta okkum hava rætt til.

Tá ið føroyingar ikki vildu ganga undir ásettu NAFO-kvotuna, tóku kanadiumenn umsíðir málið í egnar hendur og stongdu sínar havnir fyri føroyskum fiskiskipum. Stongsulin hevur borið í sær, at føroysk rækjuskip í meira enn eitt ár ikki eru sloppin inn í kanadiskar havnir.

Neyðugt hevur tí verið at sigla heim við veiðini og at skifta manning.

## Fráboðan

Í NAFO-høpi er loyvt at vera ósamdur um kvotuásetingar og fiska sína egnu kvotu í altjóða sjógvi. Eingin kann nokta føroyingum at fiska tann partin, vit halda okkum eiga rættin til, men hetta kann í ringasta føri fáa avleiðingar. Í hesum førinum vóru tað so kanadiarar, sum høvdu høvi at sekta føroysku rækjuvinnuna við stongsli.

Eftir fundin í Halifax, har eingin loysn fanst á trætuni millum londini, hevur ein breiður meiriluti í felagnum Rækjuskip gjørt eitt tilmæli til landsstýrið.

Mælt verður landsstýr-inum til at senda kanadisku stjórnini eina fráboðan sum sigur, at Føroyar fara ikki at fiska okkara egnu ásettu kvotu á Grand Bank í ár, men undir protest at ganga undir kvotuásetingina hjá NAFO.

Hetta merkir tó ikki, at Føroya landsstýri og felagið Rækjuskip sleppa kravinum um søguligu rættindini á leiðini, men vilja halda fram at arbeiða fyri hesi søk.

Ein fráboðan úr Føroyum til kanadisku myndugleikarnar fór væntandi avstað longu í gjár.

Sosialurin hevur skilt, at kanadiarar vilja taka av aftur stongsulin, tá ið nevnda fráboðan úr Føroyum er komin.

## Ikki semja

Semja er ikki í felagnum Rækjuskip um hetta mál, tí ymiskt er, hvønn týdning stongdu havnirnar vera mettar at hava. Tó metir ein breiður meiriluti í felagnum, at føroyska rækjuvinnan í longdini ikki kann liva við, at skipini ikki sleppa inn í kanadiskar havnir.

Meirilutin í rækjuskipum metir ikki, at rækjuvinnan kann liva við, at havnirnar í Kanada vera verandi stongdar.

Rækjuskipini missa umleið ein túr um árið, tí tey noyðast at sigla heim við rækjunum og at skifta manning. Ymiskt hevur verið frammi um, hvat hetta merkir í krónum og oyrum. Tøl sum 5-7 milj. krónur í tapi eru nevnd, men sum skilst á rækjuvinnuni, eru hetta bruttotøl, sum ikki kunnu brúkast til nakað serligt.

At havnirnar í Kanada og í Ný Foundlandi verða latnar uppaftur fyri føroyskum fiskiskipum, loysir ikki fíggjarligarligu trupulleikarnar hjá rækjuvinnuni, men hetta loysir í staðin nakrar praktiskar trupulleikar. Lítil meining er í, at rækjuskipini skulu virka sum farmaskip hjá sær sjálvum. Hinvegin spara skipini pening í farmaflutningi.

Í Ný Foundlandi eru tey, ið hava fingið ágóðan av føroyska virkseminum har yviri, sera hørm um stongsulin, tí rækjuvirksemið hjá føroyingum í Ný Foundlandi hevur havt stóran týdning fyri lokalsamfelagið.

Sum skilst, hava ný foundlendingar gjørt eitt stórt lobby-virksemi fyri at ávirka myndugleikarnar í Kanada til at taka stongsulin av aftur.

Nú er so ein loysn í ljósmála - tó undir føroyskari protest.

Føroyskir myndugleikar hava eisini borið uppá mál møguleikan at fáa fiskirættindi í kanadiskum sjógvi.

Sum skilst, hevði hetta kanska ikki verið ómøguligt, men spurningurin er, hvat vit hava at lata kanadiarum í staðin, tí ein slík avtala hevði helst snúð seg um fiskirættindi hjá hvørjum øðrum.



# Í ætt við navnalógina

**Tulkingingin av »í ættini « er stóra ivamálið í sambandi við lógina um fólkanøvn. Løgtingsinsumboðsmaður hevur talað ímóti kunngerðini um undantøk, og nú er landsstýrismaðurin fullkomiliga í villareiði um, hvat hann eigur at gera**

NAVNALÒGIN
*Heri á Rógvi*



*Hvør er í ætt við hvønn? Tað er hesin spurningurin, sum landsins myndugleikar hava trupult at svara.*

**ætt**[1] -ar -ir *kv*[2] **1** eftirkomarar eftir somu forfedrar (oftast fleiri ættarlið), slekt, fólk$_2$, *sama ~ var á garðinum í fleiri hundrað ár; føroyingur av ~; hann kundi rokna eina grein av ~ síni niður í tjúgunda lið; (gl.) væl av ættum komin* av góðum fólki, av góðum bergi brotin; *(tilt.) tað*

*Frágreiðingin í føroysku orðabókini hjá Føroya Fróðskaparfelag.*

Hvat merkir at vera í ætt við? Klárar tú at svara hesum greitt, so megnar tú tað, ið Løgmálaráðið ikki megnar.

Tað er nú einaferð soleiðis, at Føroya løgting stutt undan løgtingsvalinum í fjør samtykti eina nýggja endurskoðaða lóg um fólkanøvn. Hendan kann væl kallast fyri ein lítil liberalisering av lógini, sum vanliga eisini verður rópt fyri navnalógin.

Kjarnin er, at fólkanøvn eru partar av føroyska málinum, og hesi nøvn skulu eisini vera í tráð við føroyskar málreglur. Men í greinini um fólkanøvn, sum sæst aðrastaðni á síðuni, verða undantøk loyvd, har talan er uppkalling »eftir fólki í ættini«.

Har skal landsstýrismaðurin áseta nærri í eini kunngerð, sum Høgni Hoydal í hesum førinum hevur gjørt.

Navnanevndin vildi ikki loyva, at ein genta kundi eita Victoria – við C – og tað sama helt Løgmálaráðið. Hendan avgerðin varð kærd til Løgtingsins Umboðsmann, sum greitt sigur, at kunngerðin um undantøk ikki er í tráð við lógina.

## Òmøguligt

Og hvat hendir so víðari.

Kunngerðin er í skrivandi stund ikki broytt, og líkt er heldur ikki til, at hon í nærmastu framtíð verður broytt.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður í lógarmálum, ætlar ístaðin at leggja eitt lógaruppskot fyri løgtingið fyri at fáa greitt, hvat løgtingið ynskir.

Løgtingið hevur í síðstu løtu samtykt eina lóg uttan viðmerkingar ella nærri ásetingar, sum eg skal gera eina kunngerð til. Eg havi so tulkað eina orðing, so tað eisini ber til at umsita lógina. Nú virkar tað heilt ómøguligt at umsita lógina, sigur Høgni Hoydal.

Hetta er tað sama sum um, at ferðslulógin segði, at tað er loyvt at koyra 80 km/t, men summi kunnu koyra skjótari. Øll eru ikki líka, og eg kann ikki gera eina kunngerð, har øll ikki fáa líka viðferð, sigur Høgni Hoydal.

Í komandi tingsetu fer Høgni Hoydal at leggja eitt lógaruppskot fyri tingið um broytingar í lógini um fólkanøvn.

Áðrenn tingið fór heim undan seinasta løgtingsvalið, hevði Høgni Hoydal eisini lagt eitt uppskot fyri tingið. Men hetta fekk ikki undirtøku, og tískil tók hann tað aftur. Tingmenn valdu heldur at leggja eitt næstan eins uppskot fram, har munurin var, at nú kundu undantøk í ættini gerast. Men samstundis varð álagt landsstýrismanninum at gera eina kunngerð um undantøk.

– Eg vil hava tingið at siga mær, hvat tað ynskir. Tað ber ikki til hjá teimum at biðja meg gera eina kunngerð á henda hátt. Verður tað ikki gjørt greiðari, so mugu vit bara broyta navnakunngerðina hvørja ferð, onkur klagar, sigur Høgni Hoydal.

## Beinleiðis uppkalling

Anfinn Johansen er formaður fyri navnanevndina, sum umsitur lógina. Teir tulka uppkallinbg sum bókstavarøtt uppkalling, t.e. kallast abbi tín Christian, so kanst tú – ert tú eitt mannfólk – kalla teg Christian, men systur tín kann ikki kalla seg Christina, tí hetta er ikki í tráð við føroyskar málreglur.

Loyvt er at fara aftur til abbar og ommur, men ikki longur.

Soleiðis ber tað til at umsita lógina. Var kunngerðin ikki gjørt so greið, so var tað púra ómøguligt at umsita, sigur Anfinn Johansen.

Síðani nýggja lógin kom í gildi hava tey gingið 57 av 57 umsóknum um »beinleiðis« uppkalling á møti. Hann minnist bert fá dømi eins og tað við Victoriu.

## Broyta kunngerð

Ein av teimum, sum hevur verið millum heitastu fortalararnar móti gomlu navnalógini, er Jógvan á Lakjuni, tingmaður fyri Fólkaflokkin.

Hann er formaður fyri rættarnevndina í løgtinginum. Eisini er hann í familju við fólkini, sum kærdu viðviðvíkjandi navninum Victoria. Men hann heldur ikki, at hetta ger hann ógegnigan.

Eg havi fingist við hetta um navnalógina í fleiri ár. Eg havi allatíðina hildið upp á, at kunngerðin, sum Høgni Hoydal gjørdi, ikki var í tráð við lógina, sum løgingið samtykti.

Boðskapurin hjá Jógvani er eisini greiður. Hann vil hava Høgna Hoydal at fylgja úrskurðinum hjá løgtingsins umboðsmanni og gera eina nýggja kunngerð.

– Tað eru fleiri, eg veit um, sum eru í líknandi støðu viðvíkjandi uppkalling. Tað er so vanligt, at landsstýrismenn skulu gera kunngerðir, og Høgni Hoydal skal í hesum førinum fylgja viljanum hjá løgtinginum, sigur Jógvan á Lakjuni, sum ikki heldur tað vera so trupult at gera eina greiðari og betri kunngerð.

### Fakta

Í løgtingslóg nr. 41 frá 26. mars 2002 um fólkanøvn verður skrivað soleiðis um fornøvn.

§ 2. Sum fornøvn verða ikki viðurkend nøvn, sum ikki av røttum eru fornøvn, og onnur nøvn, ið kunnu haldast at verða fólki til ampa.

Stk. 2. Navnið skal vera í samljóði við føroyskar málreglur.

Stk. 3. Navn, sum ikki er á navnalistanum, kunnu foreldur ella tann, sum foreldramyndugleikan hevur, leggja fyri navnanevndina, sbr. § 21, stk. 1, ið ger av, um navnið kann verða givið.

Stk. 4. Navnanevndin kann eftir umsókn gera undantak frá stk. 2, tá ið uppkallað verður eftir fólki í ættini. Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð nærri reglur um undantøk.

Kunngerð nr. 71 frá 29. juni 2002 um undantak til navnauppkalling tulkar omanfyrinevndu lógargrein soleiðis:

§ 1. Er navn ikki í samsvari við § 2, stk. 2 í lógini, kann navnanevndin eftir umsókn í sambandi við navnagávu kortini loyva navnið, tá ið tað er beinleiðis uppkalling eftir foreldrum, ommum ella abbum barnsins. Navnanevndin kann eisini í serligum føri gera undantak til uppkalling av systkjum hjá barni ella systkjum hjá foreldrum, ið lata lív undir óvanligum umstøðum.